# 4000 kr. røkka langt í Nigeria

**Hann er erkabiskuppur fyri eina afrikanska kirkju í vøkstri. Nú fer hesin, Nemuel Babba at greiða frá arbeiðinum í kirkjuni og tí tørvi, tey hava á at røkka enn longur út við gleðiboðskapinum. Ein tílíkur evangelistur kostar einans 4000 føroyskar krónur um árið**



*Nemuel og Kaja hava sítt starv í luthersku kirkjuni í Norðurnigeria. Nú eru tey komin heim í summarfrí, og fer Nemuel at greiða frá sínum arbeiði sunnukvøldið*

TRÚARLÍV
*Snorri Brend*

**Havn:** Tað er ikki á hvørjum degi, at høvi er at hoyra ein afrikanskan erkabiskup tala á møti í Føroyum.

Sunnukvøldið verður hetta høvið í Meinigheitshúsinum í Havn, tá Nemuel Babba úr Nigeria talar.

Nemuel er ikki ókendur her á landi ella við Føroyar, tí hann hevur verið her fleiri ferðir áður. Og orsøkin til tað er hin einfalda, at hann er giftur við Kaju, sum er ættað úr Rituvík.

Hon varð send út sum trúboðari til Nigeria í 1969, og hevur virkað har síðani – í fyrstuni einsamøll, men seinni saman við manni og børnum.

Møtið í Meinigheitshúsinum byrjar kl. 18, og har eru øll vælkomin.

## Heima og úti

Við jøvnum millumbilum skipar Meinigheitshúsið fyri møtum, har dentur verður lagdur á trúboðaraarbeiðið úti í heimi.

Meinigheitshúsið er ein partur av arbeiðinum hjá Heimamissiónini í Føroyum, men hevur eisini eyguni vend út í heimin - móti teimum, sum enn ikki hava hoyrt gleðiboðskapin.

Fyrr í mánaðinum varð eitt møtið hildið við sama endamáli, tá kona Nemuel - Kaja Babba úr Rituvík greiddi frá sínum arbeiði í luthersku kirkjuni í Nigeria. Á sama møti luttók eisini Maureen Clarke úr Havn, sum arbeiðir sum trúboðari í Vesturafrika.

Í annaðkvøld verður so høvið at hoyra erkabiskuppin í teirri luthersku kirkjuni í Norðurnigeria tala og greiða frá arbeiði sínum.

Hetta er ein stór og virkin kirkja, sum telur omanfyri 600.000 limir.

## Hjartamál

Kristi Lutherska Kirkja í Norðurnigeria hevur í dag eitt víttfevnt andaligt virksemi. Alt byrjaði við at ein danskur trúboðari, sum var útsendur av donsku Sudanmissiónini, fór hagar at arbeiða í 1913.

Hóast kirkjan bæði hevur bíbliuskúlar, prestaskúlar og evangelistar í arbeiði, so er kortini stórur tørvur á at enn fleiri støð verða rokkin við gleðiboðskapinum.

Hetta er eisini eitt av hjartamálunum hjá Nemuel og Kaju, og tí hevur hann eitt brennandi ynski um, at tann kirkjan, sum hann er leiðari í, skal kunna senda enn fleiri evangelistar út til tey fjarskotnu støðini.

- Tað eru framvegis nógvir landsbýir, har tey dyrka andar og har hildið verður fast við tær gomlu tradisjónirnar.

- Her kann ein evangelistur í einum slíkum staði veruliga gera mun við undirvísing sínari. Hetta kann geva teimum ein nýggjan hátt at liva uppá og eitt heilt annað sýn uppá menniskju og vælveru sína, sigur Nemuel.

Á møtinum sunnukvøldið fer hann tí eisini at koma inn á henda tørvin. Møguleiki verður hjá fólki at tekna seg sum faddrar fyri ein slíkan evangelist, sum í okkara peningi bert kostar 4000 kr. um árið.

# Gott slag til vøkur høvd



**Í øllum arbeiðum er neyðugt at halda vitan sína viðlíka. Hetta ger seg ikki minst galdandi innan økið hjá hárfríðkanini, har nýggj modell og nýggj merki koma fram í heilum**

HÁRPRÝÐI
*Snorri Brend*

Til tess at greiða áhugaðum føroyskum frisørum frá um eitt av hesum merkjum – TIGI - og fyrimunirnar við hesum, var skipað fyri serstakum skeiði farna vikuskifti við eini danskari hárfríðkanarkvinnu, sum visti alt um hetta merkið.

Seinnapartin leygardagin vóru frisørar, modell og hesin danski skeiðshaldarin, Line á Rex, har fleiri modell sótu klár at leggja høvd til saks og hesi evnini, ið m.a. kunnu fáa hárið at sita betri.

Skilligt var, at hetta hevði teirra stóra áhuga. Tey sótu øll við penni og pappíri í hond, og skrivaðu niður tey góðu hugskotini, sum skeiðshaldarin kom við.

# Seinasta gudstænastan hjá Fonsdal

**Tá kirkjuklokkurnar ringdu til gudstænastu í Dómkirkjuni seinasta sunnudag, var tað samstundis seinastu ferð at hjálparpresturin, Jóannes Fonsdal prædikaði har á hesum sinni**

FÓLKAKIRKJAN

Væl av fólki var til gudstænastuna, teirra millum fleiri í familjuni hjá Jóannesi,

Eftir sjálva prædikuna takkaði hann á prædikastólinum fyri ta tíðina, hann hevði havt, síðani hann varð settur í hetta starvið í fjør.

- Eg og familjan hava verið glað fyri tíðina her. Og tað er tí við sorgblídni at vit nú fara higani, segði prestur.

Starvið er síðani vorðið niðurlagt, og tí var neyðugt hjá honum at finna sær annað starv.

Tað eydnaðist honum rættiliga skjótt at fáa eitt annað prestastarv: Frá 1. september er hann nevniliga settur í starv sum prestur við Emdrup Kirke í Keypmannahavn. Í næstum flyta hann og familja hansara tískil aftur til Danmarkar.

Í samband við gudstænastuna henda dagin vórðu tvey børn borin til dópin, harav Jóannes Fonsdal sjálvur slapp at doypa sín yngsta son, Samuel Fonsdal.

Undir gudstænastuni hevði ein annar prestur við somu kirkju, Sverri Steinhólm eina takkarkvøðu til Jóannes. Og síðani varð boðið til kirkjukaffi á loftinum.
*sb.*



*Jóannes Fonsdal doypir sín egna son við seinastu gudstænastu sína í Dómkirkjuni*